# Noktar at ferðast fyri almennar skattakrónur

**SITUR HEIMA** Fyrr í vikuni fór mentanarnevndin hjá Løgtinginum til Kanada at ferðast. Men ein nevndarlimur situr heima, tí hann vil ikki senda skattgjaldaranum rokning fyri eina høpisleysa ferð

Áki Bertholdsen

– Hetta er ein høpisleys ferð, og tí havi eg gjørt av at sita heima. Kári á Rógvi, løgtingsmaður, var ikki við í flogfarinum, tá ið mentanarnevndin hjá løgtinginum fyrr í vikuni legði til brots á eina uttanlandsferð, sum førir tey bæði til Danmarkar og síðani heilt til Kanada.

Kári á Rógvi er limur í mentanarnevndini og skuldi vera við á ferðini. Men komandi formaðurin í Sjálvstýrisflokkinum heldur, at hendan uttanlandsferðin er so høpisleys, at hann noktaði at fara við.

– Eg vil ikki senda skattgjaldaranum eina rokning fyri uttanlandsferð, sum er høpisleys, sigur hann við Sosialin.

Hann sigur, at endamálið við ferðini er fyrst at fara til Danmarkar at hyggja at eftirskúlum og síðani skuldi leiðin ganga til Prince Edwards Islands í Kanada at hyggja at universitetum.

– Tað er burturvið at fara uttanlands at kanna hesi viðurskifti, tí hetta eru politisk mál, sum als ikki verða raðfest í Føroyum.

– Vit hava tosað um eftirskúla í Føroyum í fleiri ár, men ongin vil játta pengarnar. Tí er tað at bíta høvdið av allari skomm at ein fjølment løgtingsnevnd fer til Danmarkar at hyggja at eftirskúlum.

– Annars vita vit øll væl, hvat ein eftirskúli er, og hvat hann inniber, so tað er ongin orsøk at fara uttanlands at kanna tað, leggur hann afturat.

Hann sigur, at sama støða er við universitetinum.

– Tað er skilligt, at ongin áhugi er at raðfesta hægri lestur í Føroyum. Tað er ikki longri síðani enn í summar, at Mentamálaráðið gav boð um at steðga við at upptaka lesandi, og tí hava vit mist fleiri væl skikkað lesandi burtur av tí sama.

Kári á Rógvi staðfestir, at meginreglan í politikki í dag er, at alt skal vera útreiðsluneutralt.

– Sostatt verður hægri lestur og útbúgving ikki raðfest og tí er tað burturspilt at fara dýrar uttanlandsferðir at kanna júst hesi viðurskifti.

Hann sigur, at hann hevur onki ímóti, at Løgtingið ferðast, tá ið tað er viðkomandi. Men tað er ikki altíð, at hann heldur, at heilar nevndir skulu avstað.

– Onkuntíð havi eg skotið upp, at tað er nóg mikið, at nevndarformaðurin fer at ferðast.

– At fara til Danmarkar at kanna eftirskúlar og til Prince Edward Island í Kanada at hyggja at universitetinum er eitt pátikið endamál, tí vit gera onki við hesi málini, tá ið vit koma heim.

– At fara til Prince Edward Island, kundi annars verið skilagott, tí vit hava samstarv við universitet har – men vit hava ikki ráð at røkja hetta samstarvið við skiftislærarum o.s.fr.

Men løgtingsnevndir eru og ferðast av og á, og í ár var so mentanarnevndin, sum átti tørn. Og so mátti pengingurn brúkast, sama, hvussu viðkomandi ferðin er.

– Men í hesum føri tykist tað sum um, at endamálið er at útvega nevndarlimunum eina uttanlandsferð so langt og so eksotiskt sum gjørligt, sigur Kári á Rógvi

*aki@sosialurin.fo*



*Kári á Rógvi, løgtingsmaður, heldur at tað er tað reina fjas, at tingfólk skulu ferðast so nógv*

GRINDABÁTAR

**Havnakenningartekin**

Í „Kunngerð um grind“ frá 8. apríl 1998 er ásett í §3 stk. 3, at: „Bátur, sum fer í grind, skal verða merktur við havnakenningartekini“.

Nevnda „havnakenningartekin“ er tí ein fyritreyt fyri at fara í grind við báti og fyri at vera við í einum grindaskifti.

„Havnakenningartekin“ fæst ókeypis við at venda sær til: Føroya Skipaskráseting, Sigmundargøta 13, postboks 1178, 110 Tórshavn, tlf. 35 15 00.

**STREYMOYAR SÝSLA,** hin 16. september 2010
Finnbogi Midjord
sýslumaður

www.torshavn.fo
TÓRSHAVNAR KOMMUNA

# Nakkalong á keiini

**Nólsoyingar sluppu ikki inn til Havnar til arbeiðis í morgun, tí Ternan hevði trupulleikar við bógskrúvuni**

Leo Poulsen

Onkur var komin vegin út á Klivakeiina, onnur vóru á veg, tá boðini bórust um, at Ternan ikki sigldi fyrsta túrin í morgun, tí motorarnir til bógskrúvuna fingust ikki í gongd. Men troystin var, at skipið helst fór at sigla túrin úr Havn klokkan 7.55.

Men tá klokkan nærkaðist 8.15, sást framvegis einki til Ternuna, og umsjónarmaðurin hjá Strandferðsluni kundi so boða frá, at tað framvegis einki nýtt var at frætta um Ternuna.

Síðani bórust boðini, at Silja Star fór at verða sett inn í sigling á Nólsoyarrutuni klokkan 9.30.

Tað hjálpti tó ikki nógv, tí flestu fólk skulu møta klokkan 8, onkur klokkan 9. Og so var tað knappliga sum í gomlum døgum. Menn fóru at rokast við at gera bátar klárar, og um 8.30 tíðina løgdu so tveir bátar av vágni til Havnar við fólki, sum vóru serliga íðin eftir at sleppa til arbeiðis.



*Nólsoyingar máttu hytta sær sjálvum í morgun. Hjálpsamir bátaeigarar syrgdu fyri, at í hvussu er eini 15 fólk kundu møta til arbeiðis klokkan 9 – ein tíma seinkað*

*Mynd: Leo Poulsen*

Nógv vóru tó farin til hús aftur, tá tað frættist, at einki hendi fyrr enn klokkan 9.30, og tey kundu so ikki møta fyrr enn í fyrsta lagi klokkan 10.

Strandferðslan sjálv var púra tigandi um tíðindini um, at Ternan hevði brek. Onga fráboðan av nøkrum slag, eingin lýsing í útvarpinum, eingin kunning á heimasíðuni. Nólsoyingar vóru bara sleptir upp á fjall og máttu klára seg sum best.

Eini 15 sluppu inn til Havnar við bátum, restin, eini 30-35 fólk, stóðu so nakkalong eftir á keiini.